# Teknikkari

**Søkt verður eftir teknikara at byrja skjótast gjørligt.**

**Førleikakrøv:**

Fyrimunur er um umsøkjarin er útbúgvin radiomekanikari, radioteknikkari ella hevur líknandi royndir.
Hevur kunnleika til teldur og net.
Kann arbeiða sjálvstøðugt.
Koyrikort er ein treyt.

**Arbeiðið umfatar:**

Uppsetan og tænastuveitan av:
Navigatións-, fiskileiti- og samskiftisútgerð og fylgisveinatænastur til skip.

Víkmar
Vestara Bryggja · Postsmoga 3033
110 Tórshavn · Tel. 352182 · info@vikmar.fo
www.vikmar.fo

# LÆRARI TIL
## Leyna- Vála- skúla

**Søkt verður eftir lærara/vikari til 7/8 avlopstímar í skúlaárinum 2007/2008**

Tann, ið verður settur, skal undirvísa:

- 1-3 árgang í heimstaðarlæru, frílesing, handverk og list
- 4-5 árgang í kristni, enskum, søgu og frílesing

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknir við prógvum, C.V. og møguligum viðmælum, skulu vera skúlaleiðaranum í hendi seinast fríggjadagin 6. juli 2007. Skulu sendast Leyna skúla, 335 Leynar.

Nærri fæst at vita um starvið hjá forkvinnuni í skúlastýrinum, Rannvá Dam, tlf. 421787 ella 252000.

Leyna- Vála Skúli hevur komandi skúlaár uml. 6 næmingar frá 1.-5. árg. og 2 lærarar.

SORINSKRIVARIN Í FØROYUM

DÓMARASKRIVSTOVAN

# Avloysari fyri skrivstovufólk søkist

Eitt áhugavert starv sum avloysari fyri skrivstovufólk í farloyvi er leyst at søkja á Dómaraskrivstovuni frá 1. august 2007 ella skjótast gjørligt. Starvið er fulltíðarstarv í 10 mánaðir.

**Høvuðsuppgávur:**
- Vanligt skrivstovuarbeiði
- Skráseting á teldu
- Telefonavgreiðsla

**Førleikakrøv**
- Skrivstovuútbúgving, HH, student ella líknandi
- Góð evni at samskifta á føroyskum og donskum máli
- Telduførleiki á brúkarastøði
- Góð samstarvsevni

**Setanar- og lønartreytir**
Setanar- og lønartreytir eru sambært felagssáttmála millum statsansattes kartel og Finansministeriet og sáttmála millum HK/Stat og Finansministeriet.

Setanarøkið fevnir um allar deildir á Dómaraskrivstovuni, tó kemur tann, ið settur verður, mest at arbeiða í sivilrættinum.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Kathrinu Magnussen, skrivstovuleiðara, á telefon 31 10 03.

**Umsóknir**
Umsóknir, prógv og møgulig viðmæli skulu sendast til

***Dómaraskrivstovuna***
*Postboks 28*
*FO-110 Tórshavn*

ella sum teldupostur til post@sorinskrivarin.fo

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 6. juli 2007 kl. 12.00.

**SORINSKRIVARIN Í FØROYUM**
tann 29. juni 2007

Hoyvíkar Skúli

# STØRV Í HOYVÍKAR SKÚLA

**Søkt verður eftir tveimum lærarum og einum námsfrøðingi.**

**Lærarastørvini:**
Annað starvið er fulla tíð og hitt er umleið 18 tímar. Endaliga tímatalið verður avgjørt í september. Bæði størvini eru tíðaravmarkað fyri lærarar við lækkaðum tímatali og vegna serligan tørv.

**Lærugreinar og flokkar:**
1. flokkur: føroyskt, heimstaðarlæra, handaverk og list.
5. flokkur: kristni og føroyskt.
6. flokkur: enskt.
7. flokkur: kristni og rokning.
Nakrir stuðulstímar.
Umsøkjarar eiga at hava læraraútbúgving. Størvini eru lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

**Stuðulsstarvið:**
Vit søkja eftir námsfrøðingi at stuðla næmingi í 3. flokki. Starvið er 27 tímar. Løn sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag.

Umsóknir við prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlanum í hendi seinast mánadagin 16. juli.

Meira fæst at vita við at venda sær til skúlastjóran, Birgit Arge á telefon 227603.

**Hoyvíkar Skúli**
Vegurin Langi
Postsmoga 3073
110 Tórshavn

Í Hoyvíkar Skúla verða komandi skúlaár umleið 500 næmingar í 22 flokkum frá 1.-7. flokk. Her fara at starvast 39 lærarar og 3 stuðlar.

# Ársaðalfundur

**Ársaðalfundur hjá Ognarhaganum í Kvívík verður í Glæmuni mikudagin 18. juli 2007, klokkan 19.00, við hesi dagsskrá:**

1. Ársroknskapurin fyri 2006
2. Nýtt Ognarhús »Yviri í Gerði«
3. Útstykking »Frammi í Gerði« og »Frammi í Forna«
4. Ymiskt

**Nevndin fyri Ognarhagan í Kvívík**

Sosialurin